## Berbatov skiftir til United



Berbatov er nú Manchester United leikari. Tað hendi, tá hann í gjárakvøldi skrivaði eina fýra ára aftalu við Premierleague og Champion League vinnaranar. United mátti gjalda gott og væl 300 milliónir krónir. Freguson hevur roynt at fingið Berbatov til felagið leingið og nú eydnaðist tað. Manchester City høvdu eisini eitt boð men tann fyrverandi Tottenham leikarin valdi at fara til tað stóra liði í Manchester. Berbatov er einasta inkeypið hjá United hetta summarið.

## Thaksin seldi City

Manchester City, sum í summar var í Føroyum og spældi móti EB/Streymi, hevur skift eigara. Thaksin Shinawatra, kontroversielli fyrrverandi forsætismálaráðharrin í Thailandi, hevur selt sínar ognir í premier league felagnum. Shinawatra hevði annars stórar ætlanir, tá hann tók yvir í City fyri 14 mánaðum síðani, men hann kom í eina trongstøðu fíggjarliga, tá thailendska stjórnin frysti inni 800 milliónir pund.

# Bárður fer til greipuvinnararnar



**Bárður Bendix Mikkelsen skal komandi kappingarárið spæla við Marienloyst Odense Volley**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Bárður Bendix Mikkelsen tekur enn eitt tørn á hægsta stig. Og við hesum fær hann møguleika at vinna danska meistaraheitið, sum hann ofta hevur verið nær við, men ongan tíð kent smakkin av*

Eftir at hava havt sín leiklut í bæði donskum og norskum flogbólti ætlaði Bárður annars at gevast við flogbólti á hægsta stigi. Hetta eftir eitt ár í Middelfart, har talan gjørdist um eitt bronsu- og eitt silvurmerki.

Nú er tó greitt, at Bárður í øllum førum tekur eitt tørn afturat. Bárður hevur áður spælt við Marienlyst, tá felagið flutti upp í bestu donsku deildina í 2001, og hann gleðir seg til at taka enn eitt tørn við felagnum, sum í vár gjørdist greipuvinnari.

- Eg havi valt at gera ein eitt-ára sáttmála við felagið. Serliga hevur tað verið kombinatiónin, aftur at sleppa at spæla Europa Cup og møguleikin at vinna DM, sum hevði størstu ávirkanina á mína avgerð. At vinna DM er tað einasta eg mangli at vinna í donskum flogbólti eftir at hava vunni steypakappingina og fingið fleiri silvur í DM í mínari tíð í Holte IF.

- Liðið virkar ógvuliga sterkt aftur í ár við fleiri donskum landsliðsleikarum og útlendskum profilum. Mín leiklutir á liðnum sum ein av hevarunum verður at stýra skjóta álopsspæl okkara, sum Marienlyst í nógv ár hevur verið kent fyri, sigur 31 ára gamli Bárður Bendix Mikkelsen.

## Andrew aftur á landslinum

**Andrew av Fløtum er aftur í landsliðshitanum, eftir at Arnbjørn T. Hansen varð noyddur at geva avboð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Toppskjúttin í Formula-deildini, Arnbjørn T. Hansen, mátti av vøllinum við skaða, tá EB/Streymur um vikuskiftið vann á B68.

Talan er um skaða í fótliðinum, og Arnbjørn hevur tí givið avboð til landsliðsferðina til Serbia.

Í hansara stað er Andrew av Fløtum úttikin. Andrew hevur í ár verið uttan fyri landsliðshitan, men síðani summarsteðgin hevur hann støðugt verið ein av sjónligastu spælarunum á HB-liðnum. Seinastu tveir dystirnar hevur hann skotið fýra mál, og tí er tað ein heitur áleypari, sum nú er komin í hitan.

Andrew av Fløtum, sum er 29 ára gamal, hevur spælt 29 landsdystir fyri Føroyar, og hevur hann skotið eitt mál í hesum dystum.



*Andrew av Fløtum hevur skotið fýra mál í teimum báðum seinastu dystunum hjá HB*

### Máltindurin

| Formula-deildin | | |
|---|---|---|
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 17 |
| Andrew av Fløtum | HB | 13 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 11 |
| Rodrigo | KÍ | 9 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 9 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 7 |
| Karoly Potemkin | NSÍ/B36 | 7 |
| Jákup á Borg | B36/HB | 6 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 6 |
| Øssur Dalbúð | NSÍ | 6 |
| Zoltán Buksegi | Víkingur | 6 |
| Hanus Thorleifsson | B36 | 5 |
| Klæmint Matras | B36 | 5 |
| Bárður Olsen | EB/S | 5 |
| Páll M. Joensen | HB | 5 |
| Bogi Løkin | NSÍ | 5 |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ | 5 |
| Jann Ingi Petersen | B68 | 4 |
| Jóan Símun Edmundsson | B68 | 4 |
| Clayton Soares | B71 | 4 |
| Gudmund Nielsen | B71 | 4 |
| Wellington Soares | B71 | 4 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 4 |
| Nenad Saric | ÍF | 4 |
| Óli Hansen | NSÍ | 4 |

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti

### Dómarabókin

| Feløg | | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|---|
| ÍF | | 41 | 5 | 56 |
| B71 | | 35 | 5 | 50 |
| Víkingur | | 47 | 1 | 50 |
| B68 | | 43 | 1 | 46 |
| B36 | | 33 | 3 | 42 |
| KÍ | | 35 | 2 | 41 |
| Skála | | 33 | 2 | 39 |
| EB/S | | 33 | 1 | 36 |
| NSÍ | | 29 | 2 | 35 |
| HB | | 25 | 1 | 28 |
| **Spælarar** | | | | |
| Símin Hansen | B71 | 4 | 3 | 13 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 9 | 1 | 12 |
| Høgni Madsen | ÍF | 8 | 1 | 11 |
| Gudmund Nielsen | B71 | 7 | 1 | 10 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 6 | 1 | 9 |
| Arnhold Berg | Skála | 6 | 1 | 9 |
| Klæmint Matras | B36 | 5 | 1 | 8 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 8 | 0 | 8 |
| Vali Miela | Skála | 8 | 0 | 8 |
| Alexander Jovevic | ÍF | 1 | 2 | 7 |
| Balazs Sinko | ÍF | 4 | 1 | 7 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 7 | 0 | 7 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 7 | 0 | 7 |
| Andras Gango | ÍF | 3 | 1 | 6 |
| Rodrigo | KÍ | 3 | 1 | 6 |
| Jan Andreasen | KÍ | 6 | 0 | 6 |
| Atli Gregersen | Víkingur | 6 | 0 | 6 |
| Magnus Skoralíð | Víkingur | 6 | 0 | 6 |
| Hanus Thorleifsson | B36 | 2 | 1 | 5 |
| Poul N. Poulsen | Skála | 2 | 1 | 5 |
| Tamas Nagy | B36 | 5 | 0 | 5 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 5 | 0 | 5 |
| Sorin Anghel | EB/S | 5 | 0 | 5 |
| Milan Kulic | HB | 5 | 0 | 5 |
| Nenad Stankovic | NSÍ | 5 | 0 | 5 |
| Óli Hansen | NSÍ | 5 | 0 | 5 |
| Pætur Dam Jacobsen | Skála | 5 | 0 | 5 |
| Niclas Niclasen | Víkingur | 5 | 0 | 5 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

### Formula-deildin

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 21 | 15 | - | 2 | - | 4 | 43 | 23 | 20 | 47 |
| 2 | NSÍ | 21 | 11 | - | 4 | - | 6 | 33 | 26 | 7 | 37 |
| 3 | HB | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 44 | 16 | 28 | 36 |
| 4 | B36 | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 25 | 16 | 9 | 36 |
| 5 | Víkingur | 21 | 9 | - | 5 | - | 7 | 34 | 25 | 9 | 32 |
| 6 | B68 | 21 | 8 | - | 2 | - | 11 | 16 | 31 | -15 | 26 |
| 7 | ÍF | 21 | 7 | - | 2 | - | 12 | 27 | 39 | -12 | 23 |
| 8 | KÍ | 21 | 5 | - | 6 | - | 10 | 25 | 33 | -8 | 21 |
| 9 | B71 | 21 | 5 | - | 3 | - | 13 | 22 | 41 | -19 | 18 |
| 10 | Skála | 21 | 4 | - | 6 | - | 11 | 18 | 37 | -19 | 18 |

### Seinastu seks dystirnir

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 13 | 6 | 7 | 15 |
| 2 | B68 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 12 |
| 3 | B36 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 12 |
| 4 | HB | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 15 | 4 | 11 | 11 |
| 5 | NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 9 | 1 | 10 |
| 6 | Víkingur | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 8 | 1 | 8 |
| 7 | Skála | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 14 | -7 | 7 |
| 8 | KÍ | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 9 | B71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 15 | -10 | 4 |
| 10 | ÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 8 | 14 | -6 | 3 |